

## Frem vann á oddaliðnum

Eingin føroyskur spælari var á vøllinum, tá ið Frem í gjár vann á oddaliðnum Fredericia í næstbestu donsku deildini. Jónas Tór Næss, sum hevur verið fastur maður á liðnum hjá Frem, er farin út í kuldan, og Gunnar Nielsen sat sum vanligt á beinkinum allar 90 minuttirnar. Frem skoraði einasta málið í dystinum, og tað gjørdi Christian Brødnum eftir ein tíma. Frem liggur nummar fýra í donsku 1. deild, tvey stig aftanfyri oddaliðið Lyngby.

## Nistelrooy gjørdi hattrick

Ruud van Nistelrooy er langt frá liðugur at gera mál, hóast hann er vrakaður bæði í Manchester United og á hollendska landsliðnum. Nistelrooy spælir nú fyri spanska stórfelagið Real Madrid, og hann var rættiliga upp á spæl í dystinum um vikuskiftið. Real Madrid spældi ímóti uppflytarunum úr Levante og vann tryggan 4-1 sigur. Nistelrooy skoraði fyrsta málið i dystinum, og eftir at støðan síðani varð blivin 2-1 til Real Madrid, skoraði hann tvær ferðir afturat.

# Michael Schumacher gevst á toppinum

**Sjeyfaldi heimsmeistarin og mest vinnandi formil 1 koyrarin nakrantíð Michael Schumacher gevst sum koyrari, men heldur fram í øðrum leikluti hjá Ferrari**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Michael Schumacher*
*Mynd: Scanpix.dk*

Tað var ein sera rørdur Schumacher, ið á almenna tíðindafundinum eftir koyringina á Monza gav boðini um, at hann velur at gevast nú. Hann segði, at hann kendi, at hetta var rætta løtan at gevast. Hann segði, at hesi 30 árini, ið hann hevur verið í motorítróttinum, høvdu verið heilt serlig fyri hann. Og at hann hevði elska hvørja løtu, bæði tær góðu og tær ringu.

Við trygga sigrinum í dag, vísti Schumacher, at hann enn hevur nógv at geva ítróttinum, men hann velur altso at gevast á toppinum. Hetta er ein stórur missur hjá Ferrari og hjá øllum hesum ítróttinum.

Michael Schumacher viðgekk, at avgerðin at gevast hevði verið trupul, men at hann kendi, at hetta var rætta stundin.

Hann segði, at hann langt síðan hevði fingið at vita, hvør avloysari hansara var, og tað var ein koyrari, ið hann var glaður fyri, at tað var hesin sum skuldi avloysa hann. Michael Schumacher vildi ikki siga, hvør avloysari hansara var, men stutt eftir varð almannakunngjørt, at talan var um Kimi Räikkönen, ið verður liðfelagi við Felipe Massa komandi kappingarár. Räikkönen hevur sáttmála fram til og við 2009, meðan Massa hevur longt sín núverandi sáttmála fram til og við 2008.

Avgerðin at gevast nú, var eisini knýtt, at Felipe Massa, ið var ein ómetaliga góður liðfelagi, og átti at fáa møguleikan at velja at halda fram í Ferrari, segði Schumacher.

Á almennu heimasíðuni hjá Ferrari sigur bilskaparin, at tá hetta kappingarárið endar, fer liðið sum vant at kunngera hvussu liðleiðslan verður komandi kappingarár, og millum annað verður nýggi leikluturin hjá Michael Schumacher í liðnum kunngjørdur.

Michael Schumacher er meira enn nakar annar vorðin ímyndin av formil 1. Nú gevst hann sum aktivur formil 1 koyrari. Hetta eftir yvir 15 ár í formil 1, harav 11 kappingarár hjá Ferrari. Michael Schumacher heldur nærum øllum metum í ítróttinum, frá 7 koyrara heimsmeistaraheitum, luttøku í at vinna 7 liðmeistaraheiti, 90 sigrum, 68 fyrstu byrjunarstøðum, 75 skjótastu umførum og 1354 stigum í sínum higartil 247 koyringum.

Við at gevast nú, er tað samstundis eitt met, ið Schumacher ikki fer at taka, hetta er metið fyri flestu koyringar. Eftir eru einans 3 koyringar hetta kappingarárið, so samlaða talið verður 250 koyringar, hetta er seks færri enn Ricardo Patrese, sum frá 70'árunum til 90'árini koyrdi 256 koyringar, skrivar ferrariworld.com.

### Úrslitið av formil 1 koyringini á Monza breytini í Italia

| Nr. | Bilførari | Bilur | Byrjunarstøða |
|---|---|---|---|
| 1 | Michael Schumacher | Ferrari | 2 |
| 2 | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | 1 |
| 3 | Robert Kubica | Sauber-BMW | 6 |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Renault | 9 |
| 5 | Jenson Button | Honda | 5 |
| 6 | Rubens Barrichello | Honda | 8 |
| 7 | Jarno Trulli | Toyota | 11 |
| 8 | Nick Heidfeld | Sauber-BMW | 3 |
| 9 | Felipe Massa | Ferrari | 4 |
| 10 | Mark Webber | Williams-Cosworth | 19 |
| 11 | Christian Klien | RBR-Ferrari | 16 |
| 12 | David Coulthard | RBR-Ferrari | 14 |
| 13 | Scott Speed | STR-Cosworth | 15 |
| 14 | Ralf Schumacher | Toyota | 13 |
| 15 | Vitantonio Liuzzi | STR-Cosworth | 17 |
| 16 | Takuma Sato | Super Aguri-Honda | 21 |
| 17 | Christijan Albers | MF1-Toyota | 18 |
| 18 | Tiago Monteiro | MF1-Toyota | 20 |
| Givnir | | | |
| | Fernando Alonso | Renault | 10 |
| | Pedro De La Rosa | McLaren-Mercedes | 7 |
| | Sakon Yamamoto | Super Aguri-Honda | 22 |
| | Nico Rosberg | Williams-Cosworth | 12 |

### HM fyri koyrarar eftir Monza

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Spania | 108 |
| 2 | Michael Schumacher | Týskland | 106 |
| 3 | Felipe Massa | Brasilia | 62 |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Italia | 57 |
| - | Kimi Räikkönen | Finnland | 57 |
| 6 | Jenson Button | Ongland | 40 |
| 7 | Juan Pablo Montoya | Kolumbia | 26 |
| 8 | Rubens Barrichello | Brasilia | 25 |
| 9 | Nick Heidfeld | Týskland | 20 |
| 10 | Ralf Schumacher | Týskland | 18 |
| 11 | Pedro de la Rosa | Spania | 14 |
| - | David Coulthard | Skotland | 14 |
| 13 | Jarno Trulli | Italia | 12 |
| 14 | Jaques Villeneuve | Kanada | 7 |
| 15 | Robert Kubica | Póland | 6 |
| - | Mark Webber | Avstralia | 6 |
| 17 | Nico Rosberg | Týskland | 4 |
| 18 | Christian Klien | Eysturríki | 2 |
| 19 | Vitantonio Liuzzi | Italia | 1 |

HM fyri lið eftir Monza

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ferrari | 168 |
| 2 | Renault | 165 |
| 3 | McLaren-Mercedes | 97 |
| 4 | Honda | 65 |
| 5 | Sauber BMW | 33 |
| 6 | Toyota | 30 |
| 7 | Red Bull Racing Ferrari | 16 |
| 8 | Williams-Cosworth | 10 |
| 9 | STR-Cosworth | 1 |

# Nú er veruliga vorðið spennandi

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Veruligur spenningur kom aftur í HM kappingina í formil 1 í dag, tá sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher megnaði at vinna koyringina á Monza, meðan kappingarneyti hansara um HM heitið Fernando Alonso koyrdi útav við einum útbrendum motori.

Ein sigur á italsku heimabreytini hjá Ferrari Monza var besta farvæl gávan, ið Michael Schumacher kundi geva sínum trúgvu tifosi, ið hava tikið týskaran til sín, sum var hann ein av teirra egnu. Men tá núverandi heimsmeistarin Fernando Alonso, ið hevði koyrt seg upp á triðja pláss, knappiliga steðgaði upp í einum rokið av roykið og motor pettum, við 10 umførum eftir, fór veruliga at kóka á heimavøllinum. Munurin millum Alonso og Schumacher er nú einans 2 stig, og við Ferrari í topformi, so tykjast sannlíkindini góð fyri, at Michael Schumacher verður 8. faldur heimsmeistari, tá han um tríggjar formil 1 koyringar parkerar Ferrari bilin í pitgaraguni á síðsta sinni.

Koyringin í dag var hendingarík, við nógvari tættari koyring. Michaels Schumacher og Kimi Räikkönen, ið byrjaði fremstur, vóru tættir alla koyringa Men eftir at Michael Schumacher kom framvið Räikkönen í fyrsta pittsteðginum, so var einki Räikkönen veruliga kundi gera. Michael Schumacher hevði frá byrjanini eitt sindur meira av bensini í sínum bili, so tá Räikkönen fór í pitt á 15. umfari, so fekk Michael Schumacher við tveimum skjótum umførum, syrgt fyri, at hann kom framvið Räikkönen.

Nýggi maðurin í BMW Robert Kubica tók øll av bóli. Hann byrjaði øgiliga væl, og lá á triðja plássi mest sum alla koyringina, inntil hann misti plássið til Alonso í síðsta pittsteðginum, men tá Alonso var noyddur at gevast, fekk Kubica triðja plássið aftur. Hann er fyrsti pólendingur, ið hevur koyrt formil 1, og er longu vorðin ein stjørna.

Felipe Massa lá beint aftan fyri Alonso og Kubica, tá motorurin hjá Alonso fór í spønir, Massa gleyð í pettunum og oljuni frá Renault bilinum, og oyðilegði sær høgra framhjól í hendingini. Hann var tí noyddur í pitt, hetta kostaði honum stig, tí hann datt av 4. niður á 9. pláss.

Giancarlo Fisichella koyrdi í mál sum fjórð bestur við bert einum pittsteðgi, í mun til tveir sum allir hinir fremstu koyrararnir høvdu valt.